# Hetta kann vera ein føroyingur



*Kennir tú hendan mannin? So mást tú venda tær til Politistøðina í Havn á telefon 351448. Hann er funnin deyður í havnini í Keypmannahavn, upplýsir løgreglan*



**Tað kann hugsast, at ein ungur maður, sum er funnin deyður í Keypmannahavn er føroyingur. Tí sendir løgreglan nú eina eftirlýsing í føroysku fjølmiðlarnar. Maðurin hevði sukursjúku og var innlagdur við minnisloysi stutt áðrenn, hann doyði**

EFTIRLÝSING

Maðurin var funnin deyður í havnini í Keypmannahavn sunnudagin 9. mars beint við Islands Brygge 18.

Hann er millum 25 og 35 ár, 177 sentimetrar høgur og vigar 86 kilo. Hann er miðal bygdur og hevur slætt miðal ljóst hár. Onnur framtonnin í yvirmunninum er brotin, og maðurin hevur sukursjúkuna, upplýsir løgreglan.

Maðurin, sum hevði sukursjúku, var innlagdur á Hillerød Sygehus týsdagin 4. mars og fór aftur av sjúkrahúsinum 8. mars. Sambært starvsfólkunum hevði maðurin mist minni, tí hann hevði ov lágt blóðsukur. Hann hevði sagt starvsfólkunum, at hann æt antin »Martin Skov ella Martin Busk« og var føddur 260570, og at hann kanska kom frá Odense og hevði lisið humaniora ella søgu.

– Persónurin kann vera ein føroyingur, tí í sambandi við eina innlegging á Hillerød Sygehus verður sagt, at hann tosaði við antin suðurjútskari ella føroyskari herðing, Vit hava tí fingið áheitan frá løgregluni í Keypmannahavn um at eftirlýsa mannin, og um fólk halda seg kenna hann, kunnu tey boða vakthavandi á politistøðini í Havn frá, sigur Jón Klein Olsen, varaleiðari á politistøðini í Havn.

Tá maðurin var funnin var hann ílætin ein gráan vindjakka, grønari sweatshirt við høgum hálsi, ljósagráum buksum og myrkagráum hálsturriklæði. Hann var í svørtum ECCO skóm, stødd 42. Hann bar eisini ein bláan ryggsekk við merkinum Fjällråven.

Av tí, at maðurin hevði sukursjúku, hevði hann ymisk diabetikaraamboð uppi á sær, millum annað ein NOVOpen, ið innihelt NOVORAPID og ein NOVOpen, ið innihelt PROTAPHAN.

Tá Sosialurin tosaði við løgregluna fyrrapartin hósdagin, hevði hon onki frætt um mannin. Tey, ið vita um mannin at siga, kunnu venda sær til Politistøðina í Havn á telefon 351448.

# Føroyar í kríggi



*Føroyar eru umvegis Danmark við í stríðnum móti Saddam Hussein, hóast løgtingið hevur mótmælt. Loftrúmið í Føroyum er opið fyri USA og tess sameindu*

**Danmark er farið í kríggj. Og harvið eru Føroyar eisini farnar í kríggi. Danska stjórnin førir uttanríkispolitikk vegna alt kongaríkið, og harvið gerast Føroyar eisini partar av krígnum, hóast løgtingið mótmælir.**

KRÍGGJ
*Ingi Rasmussen*

USA og tess sameindu eru í kríggi við Irak. Og hóast tað neyvan fer at merkjast í Føroyum, so ber til at siga, at Føroyar eru partar í krígnum.

Danska stjórnin hevur givið USA og tess sameindu politiskan stuðul við at senda ein kavbát og eina korvett til flógvan. Og stjórnin hevur eisini givið amerikanskum flogførum heimild at nýta føroyskt loftrúm í stríðnum móti Irak, um tað gerst neyðug. Tað hevur ljóðað, at flogfør hoyrdust yvir Havnini fyrranáttina. Men hetta avsannar Jan Leisborch, kommandørur yvir Færøernes Kommando. Hann sigur tað eisini vera ósannlíkt, at loftrúmið fer at vera nýtt, tí tað reint landafrøðiliga neyvan verður flogið hendanvegin ávegis til Irak.

## Flogloyvi givið

Jan Leisborch viðgongur, at Færøernes kommando hevur økt varðhaldið kring støðina í Mjørkadali síðstu dagarnar í einum »anti-terror beredsskab«. Men gerandisdagurin er sum hann plagar, og onki bendir á krígsstøðu í Mjørkadali.

Súmbólskt ber kortini til at siga, at Føroyar eru bjóðaðar fram. Á Uttanlandsdeildini hjá landsstýrinum verður sagt, at USA hevur heimild at brúka føroyskt loftrúm alt hetta árið út uttan at spyrja føroyingar eftir hvørja ferð.

– Vit hava givið USA eitt varandi loyvi at flúgva yvir Føroyum. Hetta er eitt framhald av loyvinum, sum vit góvu í fjør í stríðnum móti yvirgangi. Stutt herfyri fingu vit at vita frá ríkisumboðnum, at tað loyvið eisini fevndi um eitt møguligt álop á Irak, sigur Sigmundur Isfeldt, fulltrúi á Uttanlandsdeildini.

Politiskt er støðan margháttlig. Tí løgtingið hevur noktað at stuðla einum álopi á Irak, sum landið liggur.

## Ímóti løgtingssamtykt

Mikudagin samtykti løgtingið, at »øll tiltøk til tess at fáa Irak og Saddam Hussein at ganga undir ST-samtyktirnar skulu góðkennast av ST«.

ST hevur ikki góðkent álopið hjá USA og tess sameindu á Irak. Sostatt er tað í andsøgn við eina løgtingssamtykt, um flogfør flúgva yvir Føroyum í krígsørindum.

Samstundis stendur løgtingið í greiðari andsøgn við tann almenna uttanríkispolitikkin hjá Danmark. Og harvið okkum sjálvum. Tí Danmark førir uttanríkispolitikk vegna Føroyar.

Jan Leisborch viðgongur, at tað kann tulkast soleiðis, at Føroyar eru í kríggi.

– Tað er sjálvandi ríkið, sum fer í kríggj, um Danmark velur at fara við. So er tað ein politiskur stuðul, ið ríkifelagsskapurin velur at geva, og har eru Føroyar ein partur. Men hatta er eitt akademiskt kjak, sum hevur lítlan praktiskan týdning, sigur stjórin á Færøernes kommando.

## Føroyar mótmæla

Føroyar mótmæla sostatt sín egna uttanríkspolitikk. Jóannes Eidesgaard gjørdi eisini vart við hetta í tinginum mikudagin.

– Danska stjórnin fer í kríggj, og tað er tann almenni uttanríkispolitikkurin í ríkinum. Antin vit vilja tað ella ei, er tað eisini tann føroyski uttanríkispolitikkurin. Hetta er ein søguligur møguleiki at staðfesta, at føroyingar hava eina uttanríkispolitiska meining, sum ikki er í samsvari við donsku stjórnina. Og fyri mín part er eg sum uppskotstillari errin og stoltur av at atkvøða fyri at staðfesta, at Føroya løgting tekur ikki undir við donsku stjórnini at fara í kríggj við Irak, segði Jóannes Eidesgaard.

Ein stórur meiriluti av løgtinginum atkvøddi fyri uppskotinum hjá m.a. Jóannes Eidesgaard. 19 atkvøddu fyri, 2 atkvøddu blankt og 9 atkvøddu ímóti.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Osvald Kjærbo 80 ár

Í dag, 21. mars, fyllir Osvald Kjærbo í Havn 80 ár. Osvald er føddur og uppvaksin í Sumba. Foreldrini vóru Kristianna, systir Napoleon Jacobsen av Glyvrum, og Tummas Jákup Kjærbo úr Sumba. Tey vóru sjey systkin, Maria, Jákup, Tomasia, Arni, Viggo, Osvald og Leivur. Sum ungur flutti til Havnar, har hann arbeiddi á ymiskum skrivstovum. Fyrst í 50-unum stovnar hann sína egnu heilsølu. Sum flestu heilsølur tá í tíðini seldi hann alt frá skipsútgerð til garn og skógvar. Osvald er virkin innan brøðrasamkomuna, serliga í Havn. Hann giftist í 1950 við Judith, f. Holm Jacobsen, úr Havn, og tey eiga fimm døtur. Anna og Katrin búgva í Havn, Kristvør býr í USA, Guðrun og Jórun búgva í Keypmannahavn. Osvald er burturstaddur føðingardagin.



## Johannes Olsen farin



Mikudagin andaðist fyrrverandi formaður Føroya Arbeiðarafelags, Johannes Olsen í Sandavági. Hann var 88 ára gamal

Johannes Olsen í Sandavági andaðist 88ára gamal mikudagin 19. mars. Johannes Olsen varð føddur 15. december 1914. Sum ungur var hann fiskimaður, og hevur seinni starvast sum arbeiðsmaður og málari í Sandavági.

Johannes Olsen var eitt langt áramál limur í stjórn Føroya Arbeiðarfelags og eisini formaður í nøkur ár.

Hann varð fyrstu ferð valdur í nevd Føroya Arbeiðarafelags í 1955, og gjørdist næstformaður í 1960. Tá Gunnar Petersen, formaður, doyði í 1972, varð Johannes Olsen formaður, og sat í hesum sessi til 1975.

Johannes Olsen hevur umframt Føroya Arbeiðarafelag eisini havt fleiri onnur álitisstørv. Nevnast kunnu Sandavágs Arbeiðsmannafelag, Sandavágs og seinni Vága Sjúkrakassi og Prístalsúrokningarnevndin.

Heima í Sandavági var hann eisini millum annað kórleiðari í mong ár. Stjórnaði Sandavágs Sangkóri. Hann spældi urgu og yrkti eisini fitt av sangum. Ein teirra er kendi Sandavágssangurin, sum sonurin, kendi tónasmiðurin Knút Olsen, hevur gjørt lag til.

Sagt verður um Johanens Olsen, at hann var stillførur álitismaður, sum vigaði síni orð. Men tí, sum hann so segði, var fyrnd í.

Johannes Olsen var giftur við Estrid, fødd Dam, úr Sandavági. Tey eiga fimm børn. Knút, Eileen, Sigfríð, Einar og Elsu Anniku. Øll hava tey fingið í vøggugávu tónlistaligu evnini hjá foreldrunum báðum.

Johannes Olsen hevur seinastu tíðina verið merktur av sjúku. Fekk ein blóðtøpp seinasta heyst og hevur síðan mest verið seingjaliggjandi.

**Edvard Joensen**

## Rudolf Joensen 50 ár



Í dag, 21. mars, fyllir Rudolf Joensen í Havn 50 ár. Rudolf er føddur og uppvaksin í Klaksvík. Hann er sonur Onnu og Svend Joensen. Eftir lokið realskúlaprógv var hann til skips, ardeiddi sum timburmaður og var í sjey ár bilførari hjá Føroya Bjór, saman við Sonhard Johannesen,"bjórduoin", tey róptu. Teir vóru eisini við í tónleikarabólkinum "Ólavur Presley and his dirty ragrags". Í 1989 fór Rudolf á HF skeið, síðan til Danmarkar á RUC (Roskilde Universitets Center). Í 1998 tók hann prógv á Føroya Læraraskúla. Hann arbeiðir sum fólkaskúlalærari við skúlan í Kaldbak. Rudolf hevur verið nógv uppi í sjónleiki, var eina tíð formaður í Klaksvíkar Sjónleikararfelag. Hann var pimus motor í Norðoyastevnuteitinum saman við Eliesar í Pálsstovu og øðrum. Saman við Maibritt Johansen eigur hann 7 ára gamla sonin Virgar. Í dag er hann mest kendur sum "skíggjatrøllvertur" í gekkasendingini. Ein fryntligur dovragubbi sum vitjar inn í stovurnar fríggjakvøld. Vit ynska Rudolf tillukku við degnum.

## Sørin Olsen 20 ár hjá Ivan



1. mars hevði Sørin Olsen arbeitt í 20 ár hjá Ivan Johansen Bilum í Havn. Hesi 20 árini hevur Sørin havt ymiskar uppgávur í fyritøkuni, m.a. hevur hann staðið fyri rustviðgerðini av bilum. Hann hevur við sínum arbeiðssemi og røkiskapi verið við til at viðlíkahildi virkisbygningin og verkstaðin. Á tann hátt hevur hann verið við til at ment fyritøkuna, til tað hon er í dag. Sørin er ættaður úr Streymnesi og býr á Argjum.

## Jórun Jacobsen 60 ár

Týsdagin 18. mars fylti Jórun Jacobsen í Klaksvík 60 ár. Hon er dóttir Jógvan Hansen og Hannu í Ánunum, sum búðu á Kósini í Klaksvík.

Jórun tók millumskúlaprógv í Klaksvík í 1959 og var seinni á háskúla í Danmark. Hon giftist í 1962 við Dánjali Müller Jacobsen, sum var sonur Annu Müller úr Porkeri og Esmar hjá Jóan Jakku á Viðareiði. Jórun og Dánjal fingu fýra børn: synirnar Johnni 1964, Esmar 1969 og Kára 1975 og dóttrina Annu 1977.

Dánjal sigldi úti. Hann fekk malaria, tá hann var staddur í Nigeria við donskum skipi, sum hann var skipari á. Hann varð lagdur inn á sjúkrahús í Las Palmas á Gran Canaria, har hann doyði fáar dagar seinni, 60 ára gamal.

## Jóhan Árnastein 30 ár hjá Ivan

Í dag, 20. mars, eru liðin 30 ár síðan Jóhan Árnastein varð settur í starv sum verkførari á mekaniska bilverkstaðnum hjá Ivan Johansen Bilum. Tá Jóhan byrjaði, var verkstaðurin í kjallaranum á sethúsunum hjá Ivan Johansen á Láarvegi 7. Jóhan hevur sostatt verið við í menningini av fyritøkuni øll hesi 30 árini. Við sínum avbera góða hegni og dugnaskapi, eigur hann sín lut í tí stóra framburði, sum er farin fram hesi árini. Jóhan er úr Gásadali. Hann lærdi til bilmekanikara hjá Wenzel Petersen.



## Dagurin

21.. mars. Vársjavndøgur. Tvær ferðir um várið eru sólin og jørðin staddar soleiðis hvør móti aðrari, at dagur og nátt eru líka long. Vársjavndøgur er vanliga 21. mars, men kann eisini vera 20. mars. Dagurin er eisini Bænadiktsmessa, til minnis um Bænadikt úr Nursia, sum stovnaði eina munkaskipan, ið skjótt kom víða um londini. Bygdi eitt tiltikið kleystur á Monte Cassino í Italiu. Navnið kemur av orðinim Benedictus, sum merkir tann vælsignaði. Bænadikt doyði í 547.

NØVN Í VIKUNI
Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo
Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.